# Spískamarið hjá fiskinum hvørvur

**Føroysku koralløkini eru nærum minkað niður í eina helvt síðstu árini, og smærri friðingar gera lítlan mun. Her eru talan um mest fjølbroyttu øki í Føroyum, ið framleiða føði til fiskin, sum eru hótt, heldur leiðarin á Biofar.**

UMHVØRVI

*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*




*Grønu økini vísa, hvar korallir framvegis eru, meðan strikaðu økini vísa, hvar korallir áður hava verið. Tey trý bláu økini eru friðingarnar, ið eru framdar síðstu árini fyri at verja korallirnar. Svørtu prikkarnir vísa, hvar fiskiskapur fer fram*

Tað eru fleiri, sum vilja vera við, at einaferð var føroyski landgrunnurin ein frumskógur av korallum. Men sum í so mongum øðrum viðurskiftum, har menniskjan skal troyta náttúruna, so ávirkar tað eisini náttúruna. So við og við hevur hevur fiskiskapur minkað burtur av koralløkjunum, og harvið spískamarinum hjá fiskinum.

- Vit kunnu staðfesta, at fiskiskapur hevur troðkað seg inn á koralløkini, sum eru blivin støðugt minni. Og størsta hóttanin móti korallunum er fiskiskapur við troli, sigur Jan Sørensen, lívfrøðingur og leiðari á Havlívfrøðiligu royndarstøðini Biofar.

Jan Sørensen hevur roynt at kortleggja, hvussu nógv er til av korallum, og hvussu gongdin hevur verið seinnu árini.

Metingarnar byggja í stórstan mun á spurnarbløð, sum Fiskirannsóknarstovan hevur sent fiskiskiparum, umframt royndir, ið eru gjørdar á føroyska landgrunninum.

- Gongdin er tíðilig. Koralløkini eru minkað nærum við eini helvt seinnu árini, staðfestir Jan Sørensen.

Metingarnar vísa, at meðan koralløkini áður hava verið eini 19.000 ferkilometrar til støddar, eru økini nú minkað niður í 11.000 ferkilometrar.

### Ávaring

Jan Sørensen hevur í áravís ávarað móti gongdini. Longu í 2004 skrivaði hann ein kronikk, har hann skýrdi gongdina at vera størstu náttúruoyðing í føroyskari søgu. Síðani tá eru trý øki friðað fyri fiskiskapi.

- Tað er rætt, at trý øki eru friðað fyri at verja korallirnar. Men eftir mínum tykki hava hesar friðingar í roynd og veru lítlan og ongan týdning, tí friðaðu økini liggja mitt inni í koralløkjum. Fiskiskapurin á kantunum í við koralløkini, har nógvur fiskur er, kann jú halda fram ótarnaður, og tískil er framvegis vandi fyri, at koralløkini minka, metir Jan Sørensen.

Leiðarin á Biofar ásannar, at sjálvandi vilja trolararnir sleppa so tætt at koralløkjunum sum gjørligt, tí tað er har, fiskurin fær sína føði, og har fiskurin trívist.

- Men samstundis er hetta spískamarið hjá fiskinum. Hvørvur spískamarið, so er eisini vandi fyri, at fiskurin hvørvur, sigur Jan Sørensen.

Í samband við friðingarnar av koralløkjunum hava fleiri ført fram, at hesar friðingar jú ikki eru tær einastu, at onnur øki jú eisini eru friðað fyri fiskiskap, og at tað jú eisini bøtir um støðuna. Hesum sjónarmiði er Jan Sørensen ikki samdur í.

- Eftir mínum tykki raka aðrir, friðaðir kassar og øki ikki koralløkini. Hesar friðingar verja ikki koralløkini, sigur Jan Sørensen.

Jan Sørensen metir tað hava alstóran týdning, at meira verður gjørt fyri at verja korallirnar. Elstu korallirnar eru umleið 8000 ára gamlar, og nýggjar korallir vaksa bara hálvan til ein sentimetur um árið.

- Eru korallirnar fyrst horvnar, so tekur tað sera drúgva tíð at uppbyggja nýggj koralløki. Koralløkini eru mest fjølbroyttu øki í Føroyum, ið vit sjálvandi eiga at verja, heldur lívfrøðingurin.

Eitt annað argument fyri at verja koralløkini er spurningurin um CO2.

- Tað er staðfest, at korallir binda CO2. Tað merkir, at minka koralløkini, so økist CO2 útlátið hjá Føroyum samstundis, sigur Jan Sørensen.

Hann ásannar í sama viðfangi, at korallir eru ikki við í CO2-roknskapinum, sum londini, ið hava bundið seg til Kyoto-protokollina, skulu gera.

- Men í síðsta enda snýr tað seg væl um, hvørt vit sum samfelag vilja at gera okkara part, vilja vísa okkara góða vilja, sigur Jan Sørensen.

### Manglandi vilji

Leiðarin á Havlívfrøðiligu royndarstøðini heldur, at verandi friðingar av koralløkjum í roynd og veru gera støðuna verri enn frammanundan.

- Sagt eitt sindur fýrkantað siga politikararnir samstundis, at teir ikki ynskja at verja aðrar korallir í føroyskum øki, sigur Jan Sørensen.

Eftir hansara tykki áttu myndugleikarnir at gjørt eina yvirlýsing um, at tað ikki er loyvt at oyða korallirnar á føroyska landgrunninum. Og harumframt áttu skip havt skildu at boða frá, um tey komu til at oyða korallir.

- Harumframt mangla vit eina skipaða kortlegging av øllum koralløkjunum, tí sum nevnt byggja allar metingar higartil í stórstan mun á samrøður við skiparar, sigur Jan Sørensen.

Enn ber ikki til at staðfesta avleiðingina av, at koralløkini minka. Eitt nú um tað gongur út yvir fiskastovnarnar. Ongar kanningar eru gjørdar av hesum problematikki.



*Korallirnar eru mest fjølbroyttu øki í Føroyum og samstundis spískamarið hjá fiskinum. Seinnu árini eru koralløkini nærum minkað við eini helvt, vísa metingar*

## FAKTA

**Koralløkið samanlagt:**
19.000 km²
**Minking seinnu árini:**
8.000 km²
**Eftir av koralløki:**
11.000 km²
**Korallfriðaði øki:**
788 km²
*Kelda: Jan Sørensen*

*Sosialurin og Rás2 seta fokus á náttúru- og umhvørvismál. Í blaðnum í morgin umrøða vit onnur viðurskifti á økinum, og mikukvøldi klokkan 1930 verða náttúru- og umhvørvismál evni á politiskum Trapputingi í Miðlahúsinum. Trapputingið, ið verður skipað í samstarvi við Lívfrøðingafelagið, verður sent beinleiðis á Rás2.*